# Ferðaráðið ger seg út til næsta ár

*Ferðaráð Føroya er longu farið undir at fyrireika seg til næsta ár og hevur tveir faldarar klárar. Eingi tøl eru at vísa á enn, men Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráðnum, heldur, at árið í ár hevur verið á góðari leið, hvat ferðafólki viðvíkur*




*Heri Niclasen (vm), stjóri á Ferðaráði Føroya, leggur stóran dent á at ferðafólkið verður spjatt kring alt landið. Her er hann avmyndaður saman við norska sendiharranum í Danmark, sum vitjaði Ferðaráðið*
*Mynd: Jan Müller*

Stefan í Skorini

Mikudagin 28. oktober skipar Ferðaráðið fyri tíðindafundi, har Bornholms Forskningscenter fer at leggja sítt kanningararbeiði fram. Bornholms Forskningscenter hevur gjørt eina umfatandi kanning av ferðavinnuni í Føroyum. Kanningin fer at vísa á, hvussu nógvan pening ferðafólk leggja eftir seg, og hvørji ferðafólk leggja leiðina hendavegin, t.v.s. hvat slag av fólki velur at vitja Føroyar. Eisini hava tey kannað, hvussu Føroyar eru runnar teimum til hugs sum ferðamál.

Tey tølini fara eisini at vísa, hvussu tað hevur hilnast við ferðafólki í Føroyum í ár. Heri Niclasen heldur seg hava eina hilling á støðuni, og hann væntar at tølini fara at vísa, at ferðafólkatalið er økt nakað.

Ferðaráðið hevur longu lagt nakrar ætlanir fyri komandi ár, har gjørt verður meira burturúr teimum møguleikum, sum vit kunnu bjóða á ella í havinum.

Ein kavarafaldari er nú klárur at fara til prentingar, men tað seinasta er enn ikki komið uppá pláss. Síðani er ein havfiskifaldari eisini gjørdur, tí á Ferðaráðnum siga tey seg hava lagt til merkis, at fleiri ferðafólk hava gingið og leitað eftir hesum møguleikanum, men at sum er hava tey einki at bjóða ferðafólki, sum vilja fiska. Hetta verður alt klárt til næsta summar.

Ein stórur trupulleiki hjá ferðavinnuni í Føroyum er, at alt ov fá skelti eru hjá ferðafólki at miða seg eftir. Tí er Tórálvur Weihe, arkitektur, settur í starv at gera eina ætlan yvir, hvar skelti eiga at setast upp. Skeltini skulu vísa á nátt- og tvátthús, dvalarvikar, tjald- og kampingpláss. Tórálvur Weihe skal eisini vísa á, hvar slíkir hentleikar best kunnu leggjast.

Ferðaráðið hevur saman við Atlantsflogi og Smyril Line keypt eina lýsingarsíðu í einum ferðablaði, sum verður prentað í 400.000 eintøkum og fer um alt Týskland. Hesum vænta tey sær nógv av, og tí ræður um at vera fyrireikaður.

Umframt alt hetta verður eisini arbeitt við einum nýggjum filmi um Føroyar, sum verður eini sjey minuttir til longdar.

Tað, sum Heri Niclasen, stjóri, sær sum eina av størstu uppgávunum hjá Ferðaráðnum, er, at spjaða ferðafólkið kring alt landið, so øll kunnu fáa ágóðan av ferðavinnuni.

## Fyrilestur um økismenning

*Hvussu fáa vit eina meiri fjølbroytta vinnu? Og hvussu fáa vit eitt meiri fjølbroytt búsetingarmynstur? Hetta eru tveir av teimum spurningunum, sum Granskingarverkætlanin fyri Økismenning fer at taka upp í Norðurlandahúsinum hósdagin. Talan verður um tríggjar framløgur, ið tilsamans mynda ein fyrilestur*

**Dennis Holm:** *Flytingar av bygd í bý. Trupulleikar, orsøkir og avbjóðingar.* Fólk miðsavnast, flyta av bygd og í bý. Hetta er ikki eindømi fyri Føroyar, men hendir eisini í londunum rundan um okkum. Dennis Holm fer at greiða frá, hvør gongdin er í londunum rundan um okkum og hvussu hon hevur verið í Føroyum seinastu 10 árini. Hvørjar eru orsøkirnar, hvørjar eru avleiðingarnar uttan fyri miðstaðarøkið, og hvørjar avbjóðingar hevur gongdin við sær fyri økini uttan fyri meginøkið? Hvat er avgerandi fyri, um fólk búsetur seg uttan fyri sokallaða miðstaðarøkið?

**Bjarni Mortensen:** *Lokalt samstarv — ein vegur til vinnuligt fjølbroytni?* Vitan, nýskapan og førleikamenning eru hugtøk, ið javnan eru frammi í orðaskiftinum um vinnumenning. Í flestu førum eru teoriirnar um hesi fyribrigdi bygd á royndir úr samfeløgum, ið eru nógv størri enn okkara. Hvussu kunnu vit 'umseta' hesar royndir til okkara viðurskifti? Við øðrum orðum orðum: Hvussu skapa vit eitt umhvørvi, har vinnan mennist? Hendan spurning fer Bjarni Mortensen at viðgera. Lokalt samstarv kundi verið eitt svar: Vinnuligar fyritøkur, stovnar og einstaklingar liggja inni við førleikum, ið eisini kundi komið øðrum til góðar; men fortreytin er, at partarnir møtast. Víst verður til royndir í øðrum londum.

**Ólavur Waag Høgnesen:** *Nýggj vinnulig hugskot — søpla vit ríkidømi burtur?* Føroyingar eru eitt 'finn uppá-fólk' hevur eina ferð verið havt á munni. Hvussu er og ikki, so eru fleiri 'uppfinnarar' í Føroyum, enn flestu vita um. Hvørja lagnu fáa tey hugskot, sum vera kveikt? Hendan spurningin fer Ólavur Waag Høgnesen at umrøða. Í summum førum vera uppskotini til veruleika, gera búskap okkara meiri fjøltáttaðan og skapa inntøkur. Men í nógvum førum eru royndirnar tær, at uppfinningarnar als ikki ella eisini alt ov seint vera til veruleika. Spurningurin er: Søpla vit møguligt ríkidømi burtur? Um so er, hvat eigur at vera gjørt fyri at hetta ikki hendir?

Fyrilesturin er almennur og verður í Klingruni í Norðurlandahúsinum hósdagin 19. oktober kl. 9.30-12.00.

## Framleiða upplýsingar

*Árbók fyri Føroyar er í ár komin út í nýggjum sniði og á fløgu. Eisini er ein partur av upplýsingunum at finna á eini fløgu við hagtølum frá fleiri av grannalondunum*



*Hermann Oskarson hevur arbeitt við nýggju Árbókini fyri 2000, og hann greiddi frá útgávuni á tíðindafundi*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Stefan í Skorini

Á tíðindafundi fríggjamorgunin varð nýggja Árbókin fyri Føroyar 2000 sýnd fram fyri fjølmiðlum og øðrum áhugaðum. Bókin er í ár gjørd í nýggjum sniði, eisini er hon at fáa á fløgu.

Undanfarin ár hevur Árbókin verið í so stór og tung at fáast við. Hetta er nú tikið til eftirtektar, og í ár er hon minni enn áður. Eisini eru síðurnar tynri. Bókstavirnir eru eisini minni, men hetta ger ikki bókin verri at arbeiða við - heldur tvørturímóti. Nýggja sniði ger bókina lættari at handfara og nýta í arbeiði. Umframt at bókin er í nýggjum sniði, eru eisini undirtekstir á enskum, og tað er fyrstu ferð.

Herman Oskarson frá Hagstovuni sigur, at teirra uppgáva er at bara framleiða upplýsingar. Árbókin fer ikki í dýbdina við evnunum, men leggur nakrar yvirskipaðar upplýsingar um evnið fram. Haðani kunnu fólk so leita sær nærri inn á eitt ávíst evni.

Endamálið er, at fólk skulu brúka upplýsingarnar, og tað hevur ofta skortað fyrr. Hetta er ein uppgáva hjá teimum at gera tilfarið lættari at nýta.

Upplýsingarnar, sum eru framleiddar, eru eisini komnar út á fløgu. Fløgan er ikki í sama líki sum bókin, og við fløguni eru fleiri møguleikar at arbeiða við tilfarinum enn í bókini. Har eru upplýsingarnar meira nágreiniligar. Árbókin verður í fyrsta ikki umfari løgd út á alnetið.

Ein onnur fløga varð eisini sýnd fram, og tað var „Hagtøl um landamørk 2000“. Hetta er ein felags útgáva hjá hagstovunum í Føroyum, Grønlandi, Álandi, Danmark, Noregi, Íslandi, Svøríki og Finlandi. Hvørt land hevur tveir datagrunnar - ein á enskum og ein á egnum máli. Harumframt eru tveir felags norðurlendskir grunnar. Í grunnunum er rúgvismikið tilfar um nógv ymisk viðurskifti. Henda fløgan kostar 500 krónur, og atgongd kann eisini fáast fyri 100 krónur gjøgnum alnetið.

Niels Petersen frá Skúlabókagrunninum, sum stendur fyri útgávuni av bókini, greiddi frá, at hetta samstarvið millum Hagstovu Føroya og Skúlabókagrunnin byrjaði í 1994, og fyrsta útgávan kom í 1995. Síðani er Árbókin komin á hvørjum ári. Hetta er tískil sætta útgávan, og triðju ferð at hon eisini fæst á fløgu.

Niels Petersen sigur, at Árbókin er grundarlag undir nógvum øðrum tilfari, sum verður givið út til undirvísing í bæði fólka- og miðnámsskúlunum. Útgávan er eisini ætlað teimum, sum hava áhuga í føroyskum samfelagsviðurskiftum.

Skúlabókagrunnurin hevur givið út lærubøkur til landalæru, søgu og samtíð, samfelagsfrøði og kunningartøkni. Tær eru allar gjørdar við Árbókini sum grundarlag.

Árbókin kostar 150 krónur, og fløgan kostar 200 krónur.



